# Frágreiðing frá løgmanni 1987

Á ólavsøku í fjør helt eg, at ein avís broyting betra vegin hómaðist í búskapargongdini í Føroyum, men at støðan var so viðbrekin, at batanir kundu verða foknir, bleiv ikki ein sterkari stýring sett í verk.

Gingið er nakað longri á hesi leið, um vit ikki enn eiga øll tey amboð, sum nýtast skulu í slíkari stýring. Nakrar lóggávur eru eftir at fremja, og nakrir lógarkarmar eftir at útfyllla.

Tað, sum gjørt er, hevur kortini munað, og royndirnar at styrkja umsitingarligu orkuna á hesum øki bera á rætta borðið, og vil serliga møguleikin til eina og hvørja tíð at útvega sakkøna metan um búskaparlig viðurskifti gagna samfelagnum í framtíðini.

Tiltøk samgongunnar saman við viðráki í samskiftinum við útheimin hava skapt ávísa linking í búskaparliga virkseminum, men eisini óheppin veiðugongd á Føroyaleiðunum hevur ávirkað hetta, og tað kunnu vit harmast um.

Búskaparliga virksemið tóktist vera komið í hæddina seinna hálvár 1986, sum gongdin í lønar- og skattatølum sýnir.

T.d. eru lønútgjaldingarnar fyri hálvár 1987 einar 90 mill. kr. minni enn seinna hálvár 1986, men tó 40 mill. kr. størri enn fyrra hálvár 1986, og hetta hóast eitt hitt longsta verkfall, vit hava havt í mong ár.

Ávirkanin av minkandi veiðuni við Føroyar og lakara virkseminum á flakavirkjunum sæst aftur í øllum pørtum av landinum, og kenst hetta óheppið, har annað virksemi ikki hevur verið ov stórt, men sum heild er ikki talan um afturgongd, men heldur at vøksturin, sum verið hevur, er steðgaður á.

Tað eru tó enn øki í landinum, har íløguvirksemið, serliga byggivirksemið, er óvanliga stórt, har ein javnari gongd hevði verið meira heppin fyri samfelagsbúskapin, serliga í mun til okkara uttanlandsskuld.

Gongdin í hesum nógv umrødda tátti í okkara búskapi — uttanlandsskuldini — er annars nógv øðrvísi, enn mett var í 1984, har roknað var við 5-6 milliardum í uttanlandsskuld við árslok 1987.

Í dag framrokna hagfrøðingar skuldina til 3.750 milliónir kr. við ársenda, og merkir hetta, at nærum ongin vøkstur verður í hesi skuld 1987, og tað er sum kunnugt ikki tí, at vit eru givnir at fremja íløgur í skip, tí bert í 1987 verða hesar umleið 1 milliard krónur.

Ein serlig orsøk er fyri, at skipaíløgurnar í 1987 ikki toga uttanlandsskuldina munandi uppeftir, og er tað óvanliga stóri skipaútflutningurin, sum stóðst av, at farmaflotin ikki greiddi at svara skyldum sínum uttanlands.

Skal koma aftur til henda spurning, og her bert greiða frá, hvussu tvangssølurnar av 8 farmaskipum ávirka gjaldsjavnatøl okkara.

Í síni tíð høvdu tey 8 skipini, sum farin eru úr flotanum eitt íløguvirði uppá umleið 685 mió. kr., men verða í útflutninginum skrásett við einum søluvirði uppá 379 mió. kr. Skuldin til útlond, sum hevur verið bundin til hesar íløgur, var við

árslok 1986 umleið 608 mió. kr. Raksturin hevur givið hall, so nú riggað verður av, skal staðfestast eitt tap uppá út ímóti 300 mió. kr., harav í fyrstu syftu einar 150 mió. kr. til føroyingar, og 148 mió. kr. til útlendingar.

Á gjaldsjavnanum verða 527 mió. kr. skrásettar sum inntøkur, 379 mió. kr. fyri sølu av skipunum, og tap útlendinga 148 mió. kr. sum inntøkuflyting. Fyri at fáa enda á skuldini mugu føroyskir veðhavarar flyta 81 mió. kr. til teir útlendsku kreditorarnar. Bruttouttanlandsskuldin minkar við hesum umleið 608 mió. kr.

Tá skipini ikki sigla meir undir føroyskum flaggi, verða á gjaldsjavnanum mistar einar 107 mió. kr. í inntøkum fyri farmasigling og spardar 47 mió. kr. í keypi uttanlands, netto verða mistar 60 mió. kr., harav 27 mió. kr. í hýrum. Hin vegin verða so eisini spardar um 50 mió. kr. í rentuútreiðslum til útlendskar kreditorar.

Tær 27 mió. kr. í hýrum frá teim farmaskipunum, sum nú eru farin úr flotanum (minni enn 1 % av samlaðum lønum og 18 % av lønum frá sjóflutningi) eru kortini ikki vorðnar burturi í tjóðarroknskapi okkara, tí hesi fólkini ganga sjálvandi ikki fyri einki nú, men vinna helst hitt sama í øðrum arbeiði.

———

Útflutningur okkara — skip frátald — er heldur størri fyrra hálvár 1987 enn somu tíð í 1986, tó at nøgdirnar eru falnar við næstan 23.000 tonsum til 70.000 tons.

Selt er fyri 867 mió. kr. mótvegis 860 í fjør.

Ídnaðarfiskavørur eru minkaðar í nøgd við 20.000 tonsum, og her eru prísirnir eisini falnir 20-30% í meðal.

Útflutningurin av fiskaflaki er minkaður við 3.800 tonsum, saltfiskurin við 1300 tonsum og rækjurnar við 800 tonsum. Hin vegin er øking við 2.500 tonsum í útflutninginum av aldum laksi og sílum.

Prísgongdin hevur annars verið, at alifiskur eins og ídnaðarfiskur hevur havt stórt prísfall, frysta flakið ein lítlan vøkstur við 21% í virði.

Haldast má, at nakað verður vunnið inn aftur í nøgdunum seinna hálvár, soleiðis at fiskaútflutningurin sum heild verður eini 4.000 tons enn í 1986, og at prísirnir stórt sæð halda sær í mun til fyrra hálvár. Um so verður, fer útflutningsvirðið — áðrenn skip eru tald við — at verða um einar 2.150 mió. kr. Men tá er tað ein treyt, at dollarin ikki fellur meira í virði.

———

Verkfall hevur leingi verið á hagfrøðisstovuni í Keypmannahavn, og eru tí ongi innflutningstøl tøk fyri 1987, hesi mugu tí metast meira umvegis.

Tollinntøkur landskassans svara til heldur minni nøgdir enn í 1986, um sam-

ansetingin ímillum høgt og lágt skattaðar vørur er hin sama. Samstundis eru 25% fleiri persónbilar skrásettir fyrra hálvár í ár, og persónbilar eru ein høgt skattað vøra, t.v.s. at so mikið minni tollur kemur frá lægri skattaðum vørum.

Hin vegin týðir vøksturin í bilinnflutningi ikki uppá, at vøksturin í samlaðum virksemi er steðgaður á. Sostatt má innflutningurin av vørum til framleiðslu og íløguvirksemi verða viknandi heldur enn vaksandi.

Oljuprísurin er enn í 1987 lægri enn í 1986, so eisini har verður nakað spart.

Fyri tó ikki at verða ov bjartskygdur, verður innflutningurin — áðrenn skip — í 1987 mettur til tað sama sum í fjør, nevniliga 2.500 mió. kr.

Handilsjavnin — tá skip eru frátald — batnar eftir hesum at døma munandi í 1987.

— — —

Hesir tríggir tættir í lýsingini av búskapi okkara í innflutningi, útflutningi og tí serliga farmaskipaútflutningi viga ógvuliga nógv. Men onnur týðandi fyribrigdi eru, sum kunnu ávirka gongdina munandi. Summi av hesum komi eg aftur til, men fyribils niðurstøðan av tí, sum nú er vitað, kann varisliga setast upp soleiðis.

Vit fáa eina spakuligari gongd í vøkstri í tøkari bruttotjóðarinntøku. Eina spakuligari gongd í vøkstri í uttanlandsskuld. Eina spakuliga minking í lutfalli millum tøka bruttotjóðarinntøku og uttanlandsskuldi og vónandi ein líðandi vøkstur í produktivari framleiðslu frá teim stóru íløgum, framdar eru í fiskiskip.

T.d. er lutfallið millum uttanlandsskuld og tøka bruttotjóðarinntøku við árslok 1987 mett at blíva 0,56; t.v.s. at uttanlandsskuldin fellur til 56% av bruttotjóðarinnøkuni. Hetta kundi lættliga ligið um 75-80%, var skuldin framhaldandi vaksin sum frá 1981 til 1985, men sigast skal, at rentuískoyti úr Noregi og flytingar í samband við farmaskipini muna serliga nógv í 1987, tí kann talið lættliga hækka aftur í 1988.

Talið er kortini alt ov høgt. Kann endurtaka, at 30-35% er nógv hóskiligari málsetningur.

Peningastreymurin til hin opna føroyska kapitalmarknaðin er framvegis ov stórur, og virksemið hjá bankunum og fíggjarstovnum, kommunum og tí almenna enn ov lítið samskipað.

Landsbankin, sum vónandi fer at virka í heyst, kann møguliga í 1988 fáa fatur í henda enda, so hesi viðurskifti betri samsvara okkara veruliga tørvi.

Skatt- og avskrivingarlógirnar — samtyktar í 1985, '86 og '87 — hava avmarkað spekulatiónsvinningar, har eingin verulig framleiðsla liggur aftanfyri. Ístaðin verður nú spekulatiónin bend yvir í jarða- og aðra fastogn, sum er óskattað, og fer ein partur av kapitalinnflutninginum til hesi øki, har stór frívirði finnast. Hetta fyribrigdi noyðir ein í umfordeilingspolitikkinum at fremja nakrar nýskipanir viðvíkjandi samfelags og sosialari »service«, sum alt annað líka, heldur áttu at bíða nakað, tí meðan bíðað verður, er vandi fyri, at allur ágóðin verður bundin inn á hesi øki, har hann kemur at liggja í ov fáum hondum.

Prísvøksturin — sum verið hevur í hesum samfelag, men kortini ikki er skásettur — kemur eisini sum frálíður at dýrka byggilendi og húsaprísir, og kemur hetta at gera tað truplari at seta búgv. Annars hevur inflatiónin í 1986 verið negativ (÷2%) og er higartil í 1987 mett so lág sum + ½%. Hetta hevur verið fyrimunur fyri lønarfólkið, sum hevur havt eina hægri realtímaløn, men sum sagt kemur nakað av hesum teim ungu aftur um brekku, tá ið tey seta búgv um nøkur ár.

Ein álvarssamur skeivleiki í okkara búskaparviðurskiftum er, at tað so væl lønar seg at læna pening til spekulatión í skattaskipanini. Tað var væl ongantíð meiningin, at tað skuldi verða ein góð forrætning at læna pening til uppsparing.

Tað hevur verið torført at viðgjørt hetta mál politiskt sakliga, tí so nógvir rópa um brandskatting av rentum og uppsparing. Tað hevur tað ongantíð verið talan um. Men allir partar høvdu havt fyrimun av eini regulering her, ikki minst samfelagið og tey, sum hava brúk fyri at byggja.

Um ein ávís upphædd — rímilig í mun til inflatión — av rentuágóða kom undir lagaligu skattingina, og restin kom undir hægri skatt, og hin vegin tær veruligu rentuútreiðslurnar til húsabygging kundu verið frádrignar við ávísari upphædd ta einu ferðina, tú noyðist at byggja, meðan rentur av forbrúkslánum og vanligu spekulatiónslánum - undantikið vinnuligum lánum — ikki koma undir skipanina, hevði tú eina samfelagsgagnligari skipan enn hesa, vit nú nýta. Hetta vildi eisini trýst rentustøðið longri niður, tí bankarnir sjálvsagt vildu roynt at lagt innlánsrentuna so nær markinum fyri lága rentuskatting sum gjørligt. Alt vinnulív og øll sethúsabygging vildi havt stórar fyrimunir av hesum. Skipanin, vit nú hava, blæsir mánaðarjavna og ársjavna bankanna upp, uttan at uppsparing er aftanfyri, og tað kann bert í longdini bera í sær, at øll skipanin tekur seg sjálva av døgum.

Spell, um hetta seinasta skal henda, áðrenn støðan er búgvin til politiska viðgerð.

———

Skiparaksturin í 1986 hevur sum heild roynst betri enn í 1985, men tølini, sum eru hjáløgd hesi røðu, mugu takast við størri fyrivarni enn vanligt, tí tey eru ikki endaliga viðgjørd av fiskivinnuráði og øðrum stovnum.

Tølini sýna tekniskt rakstrarúrslit áðrenn studning, og hóast hesin varð lækkaður nakað, broytir tað ikki heildarmyndina ímillum 1985 og 1986.

Eitt av teim búskaparamboðum, landsstýrið kendi seg noytt at nýta, var ein avmarking í sokallaða fiskivinnustudninginum, sum ár um ár vaks lutfallsliga skjótt.

Hesin var í 1984 væl omanfyri 400 mió. kr. og kom í 1986 niður á 294 mió. kr. Vónandi klára vit skerini í ár við umleið 250 mió. kr.

Gagnliga virkanin av hesi stýring sannførir landsstýrið um, at rætt er at so líðandi at minka studningin niður ímóti 200 mió. kr.

Nógv kjak hevur verið um avgjaldslógirnar, løgtingið samtykti seinasta heyst. 180-190 mió. kr. varð miðað ímóti, og kemur so við og við henda upphædd inn, tó at tað hevur tikið tíð at fremja summar av lógunum í verki.

Serliga vóru tað 70 oyruni í oljuavgjaldi, sum stóðu fyri skotum. Løgið, tá ein veit, at sammett við okkara grannalond hava vit so avgjørt lægsta oljuprísin. Skipanin hevur eisini tann fyrimun, at nú ráoljuprísurin fer upp um 20 $ og heilsøluprísurin tí hækkar, so veksur prísurin til brúkaran bert við 1 oyra fyri hvørju 2 oyru, heilsøluprísurin hækkar. Vit hava sostatt skapt eina skipan, sum tryggjar brúkarunum eitt nógv longri tíðarskeið við javnari príslegu, enn annars vildi verið.

Annar fyrimunur er, at hvørt avgjaldsoyra fer í oljugrunnin, sum bert kann læna út til ávís endamál, har annars vildi verið lænt í útlondum. M.a. skuldi hetta gjørt tað møguligt at framt eina bíligari orkuútbygging, sum í seinna enda kemur brúkarunum meira til nyttu enn eitt stutt tíðarskeið við óvanliga lágum oljuprísi. Oljugrunnurin hevur 53 mió. kr. á bundnari konto í Danmark.

Talan hevur nógv verið um skeivleikan í at »busjettera« eina fíggjarlóg við stórum yvirskoti, tí hetta skuldi verið óneyðugt. Sum fyri nevnt verður ikki talan um nakað risaavlop, og tað avlop, sum verður, fær bein at ganga á, nú so stórar veðhaldsskyldur gerast effektivar. Nú sleppa vit so frá í størri mun at læna pening uttanlands til hesar skyldur, og er kortini avlop, verður hetta bundið uttanlands. Í løtuni hevur landskassin 75 mió. kr. á bundnari konto í Danmark, umframt at kassakreditturin í Tjóðbankanum, ið var 75 mió. kr., er goldin niður á 0.

Eyðkennandi er tað, at júst teir, sum grammastir hava verið at koppa ábyrgdina fyri sínar vinnulívsroyndir yvir á skattgjaldaran, skulu vera teir, ið harðast tala um óblúgv og óforsvarlig avlop í landskassaroknskapinum. Sum toll- og skattainntøkurnar í løtuni roynast, er ikki útlit til nakað risaavlop í 1987.

Støðan í dag — har ein lítil linkan er at hóma í virkseminum — sýnir, at rætt var atborið av samgonguni, tá hon í forhond royndi at medvirka til hetta. Her var mál tikið til viðgerðar og avgreitt, áðrenn tað gjørdist veruligt vandamál. Tað styrkir um álit til okkara uttanlands og gevur okkum skotbrá til at virka longri fyri teirri framleiðsluøking, sum veruliga kann loysa okkara búskapartrupulleikar. Sparsemi og afturhald einsamalt ger tað jú ikki.

Tað eru tættir í okkara búskaparmynstri, sum kortini ikki tola ov langa viðgerð og bíðan. Ein teirra er umskipanin og smidliggerðin av okkara søluskipan, har alt tykist mala í somu trongu ringrás sum áður. Tað tykist, sum tað er avgerandi í søluskipan okkara at hava ein risa á leirføti, sum hevur alt ov leingi um at venda sær. Verður hetta ikki broytt, fáa vit ikki tann pening til vega, sum neyðugur er til at renta fløgur okkara, gjalda hýrur og lønir og skapa kapital til víðari framtøk. — Hetta saman við betri stovnsrøkt og frægari viðgerð av øllum okkara tilfeingi, er einasta gongda leið.

**Fiskivinna — Fiskimøguleikar**

Størstu trupulleikarnir hjá fiskiflotanum fyrru helvt av 1987 hava verið minni veiða á summum økjum og lágir prísir, serliga á ídnaðarfiski.

Skipini á Flemish Cap hava havt vánaligastu veiðuna, menn vita um; nøgdin av rækjum við Svalbard er minkað, og eisini í fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum hevur veiðan verið væl lakari, og trupulleikar hava verið við støddunum. Heilt óvanliga prísfallið á ídnaðarfiski — sum ikki bert hevur rakt Føroyar — hevur gjørt raksturin av nótabátunum sera tungan, meðan ídnaðartrolararnir hava klárað seg betri av góðum fiskiskapi.

Lakari fiskiskapurin við Svalbard partar av árinum hevur borið í sær, at skip hava roynt at útvega veiðumøguleikar í Kanada. Í ávísan mun er hetta eydnast, tó undir harðari treytum enn fyrr. Kanadiskir myndugleikar hava latið 16 veiðuloyvir til privat feløg, og eru tað hesi, føroysk feløg samráðast við. Á stjórnarstigi ber sostatt ikki til at samráðast um rækjurættindi.

Hin vegin hevur landsstýrið havt samráðingar við kanadiskar myndugleikar um aðrar fiskivinnuspurnignar, m.a. møguleikarnar hjá salfiskalínubátum, hemara- og svartkalvabátum. Nú nýbygging er framd til svartkalvaveiðu, eru góðar vónir um, at veiðan vestanfyri fer upp frá uml. 600 tonsum til eini 4-5000 tons. Hesi nýggju skip hava havt góðan fiskiskap seinastu tveir mánaðirnar, og prísúrslitini eru góð.

— — —

Landstýrið hevur ta fatan, at svartkjaftastovnurin er størsta tilfeingið av rávøru, vit eiga, og tað er neyðugt fyri eina áhaldandi og tryggari menning av fiskivinnuni, at vit duga at nýta hetta ríkidømi. Fyri svartkjaftaskipini hava trupulleikar við sølu av skræðu- »butterfly« fløkum noytt skipini at royna aðrar framleiðsluhættir, og tað tykist nú, sum at rokkið er á mál at framleiða skæðuleyst beinfítt flak umborð. Hetta sleppur svartkjaftinum inn á hin stóra og í løtuni sera prísgóða blokkmarknaðin. Fleiri av svartkjaftaskipunum hava havt byrjunnartrupulleikar, og tað má viðgangast, at fyri at fáa hesi stóru og dýru skip at ganga væl er ikki nóg mikið bara at hava góðar fiskimenn at manna hesi skip, men líka stóran týdning hava maskinfólk á verksmiðjuni, góðskueftirlitsfólk og tey, sum stýra fíggjarskapinum og søluni hjá skipunum.

— — —

Tað er avgjørdi politikkur landsstýrisins at royna at passa veiðutrýstið til teir veiðumøguleikar, sum eru. Orðaskifti hevur verið við vinnuna um, hvussu hetta mál best verður rokkið, og sum ein byrjan er samtykt skipan fyri fiskiloyvum.

Hesin politikkur merkir øðrumegin, at har sum veiðutrýstið er ivaleysa stórt, kann bert útskifting verða loyvd, sum ikki økir um veiðutrýstið. Hetta merkir eina ávísa óhepna fastfrysting av ognarviðurskiftunum og hevur eisini trupulleikar við sær fyri ávís flakavirki, sum hava ov lítla rávøru. Hin vegin er ikki møguligt at loyva øktum veiðutrýsti eftir vanligu botnfiskasløgunum, tí hetta bert kostar hjá tí flotanum, sum longu er.

Eisini á djúpum vatni undir Føroyum er um at vera fullskipað, so møguleikar fyri øktari rávøru til flakavirkini kunnu bert finnast vesturi í havi í altjóða sjógvi. Fyrst og fremst á Hatton Banka og Reykjanesryggi. Í hesum sambandi hevur Íslands-sáttmálin stóran týdning. Stjórnarkreppan í Íslandi fekk óhepnar avleiðingar, serliga fyri snellubátarnar, men landssstýrið vónar enn, at íslendska stjórnin fer at geva okkum størri nøgd av botnfiski í ár. Eitt loyvi til at fiska kalva av rudkvotuni í Íslandi hevur verið gott íkast hjá fleiri bátum.

Landsstýrið hevur fingið eitt stórt tal av umsóknum um nýggj skip. Umsitingin hevur kannað og viðgjørt tær umsóknir, har greiðar upplýsingar um ætlanirnar lógu fyri. Støðan er tó ikki tikin enn til umsóknirnar. Tað er greitt, at á nógvum økjum eru ikki veiðumøguleikar til at loyva bygging. Á ávísum økum verður tað hildið at vera best at gera fleiri royndir við skipum, sum longu eru í drift. Men á onkrum øki eru møguleikar, sum kanska skulu roynast. t.d. skeljaveiða. Tveir bátar eru í gerð og koma í hesum ári. Umframt veiðumøguleikar eru eisini spurningar um samfelagsbúkskap yvirhøvur, sum mugu havast í huga, men landsstýrið ætlar sær í næstum undir veruliga viðgerð av umsóknunum, har bæði veiðumøguleikar og fíggjar- og búskaparmetingar benda á, at íløgur eru rættar.

Veiðan eystanfyri hevur verið góð, og ein roynd at beina nakrar av ísfiskatrolarunum burtur av føroyskum øki og loyva teimum at fiska í Barentshavinum hepnaðist væl.

— — —

Føroyska laksaveiðan er nú komin í fasta legu. Tað eydnaðist at fáa eina økta kvotu á fundi í laksastovninum NASCO næstu trý árini, og í hesi loysn liggur eisini, at tað, sum føroyingar seta út av laksasmolti, ikki skal roknast upp í hesa kvotu. Við tí skipatali, sum er, skuldi — sum fráliður — borið til at givið hvørjum laksabáti eina kvotu, sum gevur rímiligt úrslit.

— — —

Metingarnar hjá fiskivinnuráðnum vísa, at rakstrarúrslitið hjá skipaflotanum ikki verður verri í 1987 enn í 1986, tá onkrir partar av flotanum við heilt serligum trupulleikum eru undantiknir.

Ráðið hevur helst bygt meting sína á óbroytta veiðu, og her kann so minkandi nøgd gera raksturin nakað tyngri. Kortini hevur landsstýrið ikki broytt politikk viðvíkjandi studninginum til fiskivinnuna. Broytingar eru tó gjørdar í býtinum av studninginum, soleiðis at roynt verður at tryggja manningunum í ávísum pørtum av flotanum slíka inntøku, at hon støðast á skipunum, tí koma vit til, at manningin ikki støðast, missa skipini allar møguleikar fyri rímiligan rakstur. Í minkingini av studninginum liggur eisini eitt ynski um at leggja eitt størri trýst á framleiðsluna og søluliðið, at finna fram til framleiðslur og søluhættir, sum minka tørvin á studningi. Landsstýrið leggur fyri tingið í hesi tingsetu uppskot um nýggja skipan fyri prísásetingina á ráfiski, og harav fylgja eisini broytingar í stuðulsskipanini. Samstundis stuðlar landsstýrið royndum at økja um góðskuna á fiski hjá útróðrarbátum.

— — —

Tó at umsóknirnar um skip eru nógvar, kennir ein í dagliga viðurskiftinum við veiðu- og vinnulívsmenn, at íløguhungurin viðvíkjandi feskfiskaflotanum er eitt sindur fjarandi. Helst stavar hetta frá fastfrystingini av fiskivinnustuðlinum og teirri minkandi veiðuni.

Tað er ein sannroynd, at skjótt er hvønn vegin í slíkum málum. Var ikki prísurin á fiskiskipum uttanlands í botni, kundi helst ein náttúrlig minking farið fram í feskfiskaflotanum, men ringt er at sleppa snikkaleysur við at selja í dag.

Vit mugu so leggja neyðugar útskiftingar so til rættis, at vit yvir eitt áramál finna vinnumøguleikar uttan fyri føroyskt øki til tann partin av flotanum, sum ikki kann seljast uttan stórt tap. Her koma Joint-Venture royndir sterkt upp á tal.

— — —

Veiðuhagtølini 1. hálvár eru sum vant at finna í fylgiskjølunum til hesa røðu, og sýna tey hóast minni veiðu við Føroyar, størri heildarveiðu. Veidd eru á øllum leiðum 186.000 tons mógvegis 179.000 tonsum 1. hálvár 1986. Tað er serliga økta nebbasildaveiðan, sum ger seg galdandi.

**Ídnaður**

Seint á sumri 1977 setti landsstýrið eina starvsnevnd við fimm limum at kanna viðurskiftini hjá ídnaðinum í Føroyum.

Til at vera bindilið millum starvsnevndina og ídnaðin varð ein umboðsnevnd vald við 10 umboðum fyri vinnulívið. Henda umboðsnevnd skuldi tryggja, at starvsnevndin fekk »tað tilfar, sum tørvur var á«. Nevndin læt landsstýrinum álit í desember 1978, og m.a. mælti hon til at skipa eina menningarstovu fyri ídnað, handverk og tænastuvirksemi.

— — —

Í vár legði landsstýrið uppskot til løgtingslóg um menningarstovu fyri tingið. Hetta uppskot fekk góða undirtøku og varð samtykt við stórum meiriluta. Menningarstovan hevur til endamáls at menna ídnað, handverk og tænastuvirksemi. Í sambandi við hetta at ráðgeva innan tøkni, búskap, útflutning av vørum og skeiðvirksemi. Eisini skal Menningarstovan samskipa ymiskt virksemi, eitt nú virksemið hjá ymiskum almennum fíggjargrunnum.

Eitt menningarráð við 15 limum verður skipað. Hesir verða valdir millum vinnulívsfólk, fólk í almennum og hálvalmennum starvi, sum hava beinleiðis samskifti við vinnulívið, og millum fólk við góðum innliti í vinnuskúlamál. Til at skipa fyri arbeiðinum millum fundirnar hjá menningarráðnum verður eitt stýri við fimm limum valt. Landsstýrið velur formannin. Hinir fýra verða valdir av menningarráðnum og millum limir tess.

Eftir lógini kann Menningarstovan við stuðli og í samstarvi við kommunur í ávísum nærri avmarkaðum økjum seta fólk úti um landið at skipa fyri virksemi sambært endamálsgreinini í lógini. Ætlanin er, at landsstýrið skal seta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Helst verður talið av ráðgevarum úti um landið tríggir ella fýra. Ein møguleiki er, at Menningarstovan rindar helmingin av lønunum, treytað av at kommunurnar í avvarðandi øki rinda hin helmingin og skrivstovuútreiðslurnar.

Menningarstovan er farin at virka. Menningarstjóri er settur og tekur við starvinum 15. august. Næsta stigið er at víðka virksemið hjá Menningarstovuni bæði her og úti um landið.

**Landbúnaður**

Uppskotið til nýggja jarðarlóg kom ikki aftur á tingborð í setuni 1986/87, tí búnaðarnevndin ynskti rúmari tíð til viðgerðina. Henda nevnd varð til endamálið gjørd til millumtinganevnd og greiðir helst málið aftur til tingið í hesi setuni.

Føroyska mjólkin hevur nú veruliga yvirtikið heimamarknaðin og tað skjótari, enn menn droymdu um. Hildið varð, at 5% í árligum vøkstri var rímiligur málsetningur, men fyrstu 6 mánaðirnar í ár er framleiðslan vaksin heili 21%.

Hetta fekk so enn einaferð bikarið at flóta yvir, og er nakað av mjólk farin fyri skeytið í ár.

Tiltøk til tess at javna framleiðsluna yvir árið mugu tí fremjast, og møguliga

er javningarstudningurin amboðið, sum skal nýtast enn meira, men verður tá helst neyðugt at minka prísin summarhálvárið, so meira verður tøkt vetrarhálvárið.

Nýtslan av mjólk er um 7 mió. litrar árliga, og verður framleiðslan í ár millum 5,5 og 6 mió. litrar.

Avloysingarskipanin, sum avtalað varð í samgongugrundarlagnum, er farin at virka í hesum árinum. Bøndur kunnu nú fáa frítíðaravloysing um royndarstøðina í tann mun, henda kann lata fólk.

Arbeitt verður eisini fyri at fáa sjúkraavloysing, og er uppskot um at normera eitt starv á Royndarstøðini til hetta endamál.

Arbeitt hevur verið við uppskoti um prísjavningargrunn fyri landbúnaðarvørur, men eru menn ikki samdir um slíka skipan, tó kemur hon møguliga til viðgerðar í tinginum hesa setuna.

**Alivinnan**

Tá ið hetta landsstýrið tók við, var onki samsvar millum smoltaling og sjógvaling. T.d. kundu tey nýggju loyvini til sjógvaling á vári 1985 bert fáa 14.000 smolt. Hesi áttu at fingið eini 60-70.000 smolt, um trygt grundarlag skuldi verið undir lønandi rakstri.

Tíverri kundu við eisini sanna, at ov nógv loyvi til sjógvaling vóru givin á ávísum økjum, uttan at nóg nágreiniligar árinskanningar vóru gjørdar frammundan. Talan verður tí um at kanna møguleikan fyri at flyta sjógvalistøðir burtur av hesum økjum, samstundis við at heilt nágreiniligar árinskanningar verða gjørdar á øðrum økjum, áðrenn ov nógv loyvi verða givin.

Vánaliga smoltstøðan og tørvandi árinskanningar vóru orsøkin til, at landsstýrið hevur verið afturhaldandi, tá talan hevur verið um at geva nýggj loyvi til sjógvaling. Smoltframleiðslan er økt so munandi, at vit nú kunnu tosa um, at javnvág er komin í. Í ár er framleiðslan millum 3 og 3,5 mió. smolt. Næsta ár verður hon 4 mió. Árinskanningar eru og verða gjørdar. Grundarlag skuldi sostatt verið fyri nýggjum loyvum til sjógvaling.

———

Alivinnan er í ávísum fíggjarligum trupulleikum. Í høvuðsheitum eru orsøkirnar trinnar. Tær alt ov smáu smoltnøgdirnar tey fyrstu árini, tann lági marknaðarprísurin, sum verið hevur tey seinastu tvey árini afturímóti árunum frammanundan, og tann stutta avdráttartíðin av lánum. Landsstýrið hevur sett eina kanning av hesum viðurskiftum í gongd. Aliráðið, Ídnaðargrunnurin og Menningargrunnurin gera kanningina saman við einum privatum ráðgeva. Úrslitið fyriliggur um nakrar fáar dagar.

Fyri at bøta um fíggjarligu støðuna hjá vinnuni hevur landsstýrið millum

annað hugsað sær at broyta áramálið í øllum aliloyvum. Higartil eru øll aliloyvi givin at galda í sjey ár. Avdráttartíðin hjá Ídnaðargrunninum, Menningargrunninum og øðrum lánistovnum er hareftir. Tá ið kanningin av fíggjarligu støðuni hjá alivinnuni er lokin, fer landsstýrið at taka støðu til, um áramálið í aliloyvunum verður at seta upp í 10 ella møguliga 12 ár. Ídnaðargrunnurin, Menningargrunnurin og aðrir lánistovnar fara so væntandi at leingja avdráttartíðina í sama mun.

———

Á lóggávuøkinum kann verða nevnt, at lógin um sjúkur hjá fiski er avgreidd á tingi og lýst at galda, at lógin um aling er í millumtinganevnd og verður vónandi avgreidd í hesi tingsetuni. Í farnu tingsetu varð tinglýsingarlógin eisini broytt, soleiðis at tað nú er møguligt hjá lánistovnum at veita fígging móti trygd í fiskinum. Eftir er nú at gera uppskot til lóg um útseting og havbit. Kanningar í sambandi við slíkt lóggávuarbeiði fara í gongd nú.

Djóralæknatænastan er eitt týðandi mál hjá alivinnuni. Normering er til ein fiskasjúkudjóralækna. Hetta starv er sett. Landsstýrið hevur boðið sær til at útvega hølir og amboð til ein fiskasjúkudjóralækna afturat. Hetta er treytað av, at vinnan vil gjalda fyri hesa tænastu í tílíkan mun, at gjøldini frá vinnuni svara til ta løn, ein fiskasjúkudjóralækni skal hava. Í løtuni bíðar landsstýrið eftir einum útspæli frá vinnuni. Málið er at tryggja alivinnuni eins góða djóralæknatænastu og landbúnaðinum.

———

Eftir teimum metingum, sum gjørdar eru, verður útflutningurin av alifiski 10.000 tons í 1989 og 12.000 í 1990. Við verandi marknaðarprísum skuldi hetta givið eitt útflutningsvirði uppá ávikavist 500 og 600 mió. kr. nevndu ár.

## Sjóvinnumál

Í sambandi við trongstøðuna hjá farmaskipaflotanum eru átta skip seld á tvingsilssølu í Rotterdam í ár og fyrra árið.

Hesi skip vórðu øll latin føroyskum eigarum sum nýbygningar í tíðarskeiðinum 1982-1985. Tapið, sum landskassin hevur havt av hesum skipum, er umleið 150 mió. kr. Talan er um stuðulslán og veðhald.

Høvuðsorsøkin, til at skipini komu í hesa trongstøðu, var, at raksturin av skipunum bert var førur fyri at bera eina skuld, ið var helvt ella minni enn ein helvt av tí skuld, sum skipini høvdu, tá tey komu.

Á tvingsilssølunum eru skipini keypt fyri eina helvt og í summum førum fyri minni enn eina helvt av tí, tey kostaðu at byggja. Tøl vísa, at í meðal vóru frak-

tratur og dollarakursurin ikki lægri í 1985 og fyrru helvt av 1986 enn í februar 1984, tá ið tey fýra av skipunum komu til landið.

Eftir hesum kann sigast, at orsøkin, at skipini komu í trongstøðu, var tann, at inntøkurnar vóru munandi lægri enn mett varð, og at rentuútreiðslur og aðrar útreiðslur væl hægri enn mett, og kemst hetta m.a. av, at skipini gjørdust dýrari enn ætlað.

— — —

Landsstýrið var sinnað at hjálpa feløgunum, áðrenn skipini fóru á tvingsilssølu. Landsstýrið beyð sær til at umleggja skuldina til landskassan, t.v.s. veðhald og stuðulslán til lán, sum skuldu verða rindað aftur yvir 12 ár við eini rentu uppá 4½% p.a. aftaná 3 ár. Um raksturin aftaná 3 ár ikki var førur fyri at rinda rentur og avdrátt av skuldini til landskassan, var landsstýrið sinnað til at tosa við feløgini um nýggjar treytir, tá 3 ár vóru liðin.

Í sambandi við tað eina skipafelagið hevur verið sagt, at felagið hevði greiðar avtalur við týska bankan og við landspartasjórnina í Slesvig-Holstein. Eftir at hesi fýra skipini vórðu seld, var landsstýrið gjørt til syndabukk, men umrøddu avtalur hevur landsstýrið ongantíð sæð.

Hin vegin fekk landsstýrið greitt at vita, at treytin frá onkrum ánara var, at landskassin bert kundi vera við sum parthavari við lítlari upphædd, hægst 5 mió. kr.

Tá sagt hevur verið, at landsstýrið — umframt 150 mió. kr. í útleggum — átti at sett seg fyri munandi upphæddir fyri at varðveita hesi ov dýru skip í Føroyum, er hetta ógvuliga grunn búskaparlig hugsan.

Sum gongdin varð vorðin, var samfelagsliga talan um eitt beinleiðis hall uppá 20 mió. kr. árliga, og eru tá ikki avskrivingar tiknar við. Skuldu eisini hesar — umleið 70 mió. kr. árliga — verið fluttar yvir skattgjaldararnar frá øðrum vinnuøkjum í Føroyum, vildi talan verið um beinleiðis hall fyri samfelagið uppá 90 mió. kr. árliga.

Til tess at varðveitt eitt hall uppá 20 mió. kr. árliga í Føroyum skuldi landskassin sostatt í fyrstu syftu spent seg fyri hundraðir av milliónum uttan vissu fyri, at hesar komu aftur um nøkur ár við bøttum marknaði.

Landsstýrið metti tað skeivt, at spenna annað fyri enn tey veðhald, sum longu vóru givin. Havandi í huga, at hesir sjómenn undir galdandi umstøðum lættliga fingu annað arbeiði, og havandi í huga, at skip av sama slag lógu til sølu í ymsum havnum fyri prísir, sum ikki komu upp í helvt av teimum, sum fóru, vildi slík yvirtøka av privatari ábyrgd verið fullkomiliga ábyrgdarleys mótvegis skattgjaldarunum.

Marknaðurin er framhaldandi gingin niður, og skulu íløgur fremjast, sum eru greiðar at virka, tá hesin gongur upp aftur, er skilabetri at keyp skip, sum nú fáast fyri botnprís.

Nevndi í fjør ta hugmóðigu liberalismu, sum bert stendur mát, tá landskassin er opin, men tað er avmarkað, hvussu nóg ber til at opna hann.

Vit hava frammanundan eitt framleiðslutól í fiskivinnu- og fiskatilvirking, sum byggir á eitt náttúrligt rávørutilfeingi, og har tann umfordeilding, sum skattgjaldarin er við til at fremja, samstundis tryggjar honum inntøkuna. Skulu vit fjøltátta vinnulívsroynd okkara, má tað vera við tættum, sum eiga ein náttúrligan rentabilitet.

Í hesum føri er »rávørutilfeingi« okkara dugnaliga og vællærda sjófólk, og eg eri tí sannførdur um, at skilagóð fyriskipan framvegis kann geva okkum eitt haldgott støði til at byggja hesa vinnu uppá.

— — —

Landsstýrið hevur fingið fyrispurning, um møguleiki er fyri at skáseta donsk farmaskip í Føroyum. Her er talan um eina ætlan, har føroysk feløg átaka sær at reka donsk farmaskip, soleiðis at ágóðin so sum hýrur, umsiting, viðlíkahald o.s.fr. kemur føroyska samfelagnum til góðar. Talan er um donsk partsreiðarafeløg. Eisini hava fyrispurningur verið frá øðrum londum.

Var talan um partafeløg, vildi einasta treytin verið, at meirilutin av nevndarlimunum skal hava fastan bústað í Føroyum, men tá talan her er um partsreiðarafeløg, er spurningurin fløktari. Helst er ikki møguligt at skapa lógargrundarlag fyri hesum. Tað eigur eisini at verða umhugsað gjølla, áðrenn vit sleppa politikkinum um helst at eiga skipini á føroyskum hondum.

## Orkuútbyggingin

Í ár er í fylgiskjølunum frágreiðing frá Orkuráðnum, sum vísir, at arbeitt verður sera álvarsliga við lívsneyðugu orkuútveganini og orkusparingini.

Kanningar ráðsins hava fevnt um:

Egin elverk á virkjum, avlopshita frá brenni- og kraftstøðum, vatn- og vindorkumátingar, árinskanningar, partroling, vatnorkuútbygging og streymorkuverk.

Serliga forvitnisligt er tað, at S.E.V. og Orkuráðið eru komin væl ávegis við fyrireikan av víðari útbygging av vatnorkuni í Eysturoy.

Helst fer S.E.V. fyrsta dagin at søkja friðingarnevndina um góðkenning av endaligum projekti til útbygging í erva.

Kanningin, ið danska orkumálaráðið hevur latið gera av møguleikunum fyri at nýta havstreym í orkuverkum, er ógvuliga spennandi.

Landsstýrið, S.E.V. og Orkuráðið fáa í heyst nærri kunning um hetta mál, tá umboð fyri teir, ið gjørt hava projektið, koma til Føroya.

### Íbúðarmál

Lógin um íbúðagrunn virkaði ikki eftir ætlan, m.a. tí kommuna, sum setti 18 % í eina íbúðarbygging, misti pening sín til grunn, um íbúðin varð seld, og tí at fólk bert kundu búgva í íbúðagrunnsíbúð í fimm ár.

Nevndin, sum landsstýrið setti at endurskoða lógina, mælti til heilt nýggja lóg um íbúðagrunn, og ognarviðurskiftini eru eisini broytt soleiðis, at nú er tað ikki grunnurin, sum er ánari, men íbúðafeløg, íbúðastovnar og kommunur.

— — —

Lógirnar um rentustudning til samansparing til sethús- og íbúðarbygging og um húsalánsgrunn eru broyttar og gjøgdar liðiligari.

Rentuískoytið er hækkað úr 2% upp í 3%, og loyvt er húsalánsgrunninum í ávísum førum at veita lán til keyp av eldri húsum.

— — —

Leigulógin verður nú endurskoðað. Hon kom í gildi í 1940 undir teim serligu umstøðunum, ið tá vóru. Leigulógin hevur bert virkað í Tórshavnar kommunu.

Landsstýrið roknar við, at uppskot til nýggja leigulóg kann koma fyri tingið í hesi ella næstu setu.

### Almannamál

Almannastovan fekk seinasta heyst nýggjan bygnað, og varð 1. januar 1987 nýggjur stjóri settur, samstundis sum skipað varð serligt starv til løgfrøðiliga ráðgeving og lógarsmíð, sum fráfarandi stjórn hevur um hendi.

Umframt eitt hóskiligari starvsbýti eru fleiri nýggj størv normerað, og verður bøtt um hølisviðurskiftini.

Neyðuga umsitingin av almannalóggávuni skal liggja so nær brúkarunum sum møguligt, og er innan almannaverkið sett miðspjaðingarnevnd, sum skal liggja sosialu eindirnar úti um landið til rættis. Nevndin fer í næstum kanningarferð til Grønlands, har nógv av sosialari umsiting er á bygd.

— — —

Nú blokkstuðulsavtalan frá 9. mars 1987 er samtykt, fara fram nógvar javnføringar innan almannaveitingar bæði á økjum innan blokkstuðulin, og har danir og føroyingar framvegis fremja helvtarbýti, t.d. viðvíkjandi fólka-, avlamis- og einkjupensiónunum.

Serliga fáa hjún og avlamin munandi pensjónshækking frá 1. oktober í ár.

Fylgilóggávan, sum stendst av umskipanini av ríkisveitingum, verður løgd fyri tingið á næsta fundi, og har kunnu nevnast broytingar í forsorgarlógini, ið javnstilla arbeiðsloysi og sjúku, og sum gevur møguleika at hjálpa, tá ið talan er um serliga stórar bústaðarútreiðslur og forsyrgjaraskyldur.

— — —

Endurbúgvingin verður flutt frá avlamispensiónslógini til forsorgarlógina og umsitin sambært hesa.

Ein virkin endurbúgvingarpolitikkur vil geva møguleika fyri skipan av vardum arbeiði í privatum og almennum stovnum, har tað almenna kann rinda lønarískoyti, sum minkar um pensiónsútreiðslurnar og mennir hin einstaka og samfelagið.

— — —

1. januar 1988 verður øll serforsorg í Føroyum á føroyskum hondum, og andveikraverndin og skúlin á Trøðni verða yvirtikin. Í hesum sambandi verður neyðugt at seta út í kortið viðvíkjandi framtíðarrinnar sosialverki í Føroyum, serliga hvussu serforsorgin skal skipast. Foreldrafeløg og áhugabólkar mugu í hesum sambandi verða eftirspurd.

Landsstýrið fór beinanvegin at útbyggja til andveikraverndina í smærri eindum, og er nú komið ávegis við hesum. Bygging í Runavík og bygging av umlættingarheimi í Klaksvík — sum sjálvsognarstovnar — eru farin í gongd. Leiðari er settur til vardan verkstað í Klaksvík og landsstýrið fer í næstum at seta leiðara til verkstað inni á Bakka í Vági. Hesir báðir stovnar verða riknir undir andveikraverndini.

Landsumfatandi kanning viðvíkjandi tørvi á bústovnum til brekað fer fram, og meinginin er at røkka viðurskiftunum hjá øllum brekaðum, so grundarlag verður undir víðari útbygging av serforsorg og útvegan av arbeiðs- og útbúgvingartilboðum.

— — —

Røktarheim til 48 búfólk er liðugt í Suðurstreymoy, og í Sandoynni verður fyrireikað bygging til 24 røktarsjúklingar. Semja er um at byggja í trimum deildum, ið hvør sær røkir felagsuppgávur fyri hinar, t.e. matgerð, vask og umsiting. Í Norðstreymi er eisini talan um at byggja í smærri eindum, og verður arbeitt við reglugerð fyri hesar.

Hildið verður, at tað er eins bíligt at reka smærri sjálvstøðug røktarheim sum tey størru, ið eru sambygd við sjúkrahús, og er tí spurningurin, um hesi skulu

rekast óheft av sjúkrahúsinum.

Úr syðru helvt í Suðuroy er umsókn komin um bygging av røktarheimi, og kannar almannastovan tørvin.

Afturatbygging í Eysturoy, sum fevnir um 12 pláss, verður fyri fyrstu ferð eisini til ung rørslubrekað.

———

Nevnd er sett at samskiupa heimahjálparskipanina og heimasjúkrasystraskipanina og at tilevna uppskot um, hvussu hesar kunnu knýtast saman við eini døgnvaktarskipan og eini umhvørvissálarrøkt. Lækni verður settur til hesa sálarrøkt, sum skal fara fram »ambulant« úti um landið.

Hetta fyri uppaftur betri at røkja politska setningin um at hjálpa fólki at búgva heima sum longst. Hesar skipanir saman við møguleikanum fyri samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum heima, hava minka munandi um tørvin á røktarheimsplássum.

———

Á fíggjarlógini eru settar upphæddir til rakstur av nýggjum blindaheimi og deyvahúsinum, sum reist varð fyri nøkrum árum síðani.

———

Í seinastu tingsetu varð dagpeningalógin broytt, so dagpeningatíðin við sjúku verður longd úr 13 vikum upp í 20 vikur; hetta fær gildi 1. oktober í ár.

Sjálvbodna dagpeningaskipanin, sum fólk í sjálvstøðugari vinnu og húsmøður kunnu tryggja seg í, verður ov lítið nýtt, og kannar landsstýrið tí møguleikan fyri, at hesi verða betri tryggjað.

Kunngerðin frá 20. juni 1979 um dagpening verður nú endurskoðað.

———

Løgtingið hevur samtykt at hækka skattalágmarkið hjá pensiónistum og somuleiðis inntøkumarkið fyri brennioljustudning, hartil eru bjálvingarstuðulslánini hækkað úr 25.000 kr. upp í 45.000 kr.

Arbeitt verður nú við at endurskoða inntøkumarkini, sum bera í sær, at lækkingar verða framdar í pensjónsupphæddum og viðbótum.

At eldri fólk eru virkin, so leingi tilber, er eftirynskjandi, og eiga tí at verða ávísir møguleikar fyri eykainntøku út yvir pensjónina.

Landsstýrið hevur boðað landsfelag pensjónistanna frá, at sett verður eitt pensjónistaráð, ið kann ráðgeva um viðurskifti pensjónista, so sum gjørt verður í øðrum londum.

**Familju- og trivnaðarmál**

Frá 1. okt. 1987 verður veitt øllum kvinnum, ið fáa børn, full dagpeningaupphædd í 20 vikur og aftaná 1. juli 1988 í 24 vikur. Lógin javnsetir allar kvinnur og gongur fyri hina heimaarbeiðandi mammuna longri enn í hinum norðanlondunum.

Tá við her veita betri sømdir enn danir, er náttúrligt, at landskassin einsamallur ber meginpartin av útreiðslunum. Eisini er ætlanin at fáa samtykt skiftireglur, sum bera í sær, at mammur, sum 1. okt. 1987 fáa dagpening, koma undir lógina, t.v.s. eisini slíkar, sum hava átt, áðrenn lógin kom í gildi.

———

Lóg um barnastyrk er samtykt at galda frá 1. okt. 1987, meðan lóg um barnafrádrátt í skatti fer úr gildi 1. januar 1988.

Henda umlegging er framd fyri at stuðla smábarnafamiljum, so betri møguleiki er fyri at vera meira saman.

Barnastyrkurin er inntøkujavnaður, tí ætlanin er, at hann skal gagna mest, har inntøkan er lítil.

Møguleikin fyri serligum sømdum til foreldur, sum ansa børnum sínum heima, og til teirra, sum hava brekað børn, tey mest møguligt vilja taka sær av sjálvi, verður framvegis kannaður.

———

Lóg um eykapensjón til giftar avlamispensjónistar, soleiðis at teir varðveita fulla grundupphædd uttan mun til inntøku hjúnafelagans, fær gildi 1. okt. í ár, og er harvið ein ójavni millum danskar og føroyskar pensjónistar burturtikin.

Somuleiðis er ætlanin at javnseta hjún, ið fáa fólkapensjón, við donsk hjún.

———

Játtanin til at minka um rúsevnismisnýtslu er munandi økt, og er stuðul veittur til viðgerðarheim hjá Losjuni og Bláa Krossi.

Heilbrigdi á Velbastað — ið verður rikið eftir heimild í forsorgarlógini — hevur farna hálvárið havt 123 fólk í viðgerð, og 125 vóru í 1986 til viðgerðar í Íslandi.

Sett er tubbaksráð, og verður umhugsað at seta eitt alkoholráð, sum kann viðgera spurningar í samband við vaksandi rúsdrekkamisnýtslu og gera kanningar í økinum.

———

16. § í S. T.-fráboðanini um mannarættindi sigur m.a.:

*»Familjan er náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin í samfelagnum og hevur*

krav uppá verju samfelagsins og ríkisins.«

Samgongan ynskir at reka politikk í samljóði við hesa ásannan og leggur dent á, at tey, sum hava stuðul fyri neyðini, kunnu fáa hann heima og frá sínum egnu. Í hesum ljósi skulu ábøturnar á lógirnar um ansingarstuðul, heimahjálp, barnastyrk, barsilsorlov metast, eins og útbyggingin av dagrøktarskipanum og dagstovnum.

**Kommunumál**

Landsstýrið vil halda fram við miðspjaðingarpolitikki sínum, soleiðis at almennir stovnar fáa deildir á bygd á sama hátt sum lækningarráðið og arbeiðseftirlitið.

Sum nevnt verður virkað fyri at útbyggja almannaverkið á bygd. Uppskot kann væntast í næstum um bygging av vinnuskúlum á bygd og flyting av einstøkum almennum stovnum.

———

Kommunulógin eigur at verða endurskoðað, so tað gerst møguligt hjá kommunum at ganga saman um at loysa sosialar og tekniskar spurningar.

———

Landsstýrið miðar ímóti at hækka kommunala lánigrunnin og víðka um lániheimildir hansara, so at óneyðugt verður at fara so nógv uttanlands eftir lánum. Ein byrjan er gjørd við avlopi landskassan fyri 1986, ið fyri ein stóran part er lagt í kommunala lánigrunnin.

Kommunali lánigrunnurin hevur í 1986 veitt tilsamans 3 mió. kr. í láni til 3 kommunur (Runavík, Skála og Vág). Samlaða útlánið er uppá 7,6 mió. kr.

———

Planleggingarnevnd er sett og fer at koma við uppskoti til eina nýggja byggi- og býarskipanarlóg. Verandi lógin er frá 1954.

Hugsað verður eisini um fíggjarliga planlegging.

———

I. R. F. hevur fingið endaligt loyvi til at byggja brennistøð úti á Vík í Leirivík, og er farið undir byggingina. Stjóri er settur.

Tórshavnar býráð hevur tikið sína brennistøð í nýtslu, og hon verður royndarkoyrd í løtuni.

**Heilsuverkið**

Nú stuðulssamráðingarnar eru loknar, verður av álvara farið undir viðgerð av útbyggingarætlanunum fyri tey trý sjúkrahúsini, herundir at leggja tær tilrættis soleiðis, at tær samsvara best møguligt við okkara fíggjarligu orku og trýstið á arbeiðsmegina á byggiøkinum.

Neyðugt verður við sterkari stýring á hesum øki, skulu vit ikki missa tamar-

haldið, og noyðist landsstýrið at útvega sær serkøna óhefta ráðgeving, sum kann døma um tey tilmæli, vit fáa frá okkara egnu, tá hesi í so stóran mun hava verið merkt av lokalum áhugamálum.

Virkandi sjúkrahússtjóri hevur gjørt ein samandrátt av virkseminum seinasta árið og teim samtyktum, gjørdar eru viðvíkjandi heilsuverkinum. Hesin er at finna í fylgiskjølunum.

**Skúli og undirvísing**

Útlit eru til, at tann økta játtanin á fíggjarlógini til gerð av undirvísingartilfari á føroyskum fer at sýna seg við øktum útgávuvirksemi í næstum.

Avgerð er nú tikin um, at Landsmiðstøðin fyri undirvísingarambod fyribils fer at leiga seg inn í ein part av tí bygningi við Hoyvíksvegin, sum Húsalánsgrunnurin og Menningargrunnurin hava keypt. Seinni er so ætlanin at keypa henda part av húsinum til landsmiðstøð.

Lesiætlanarnevnd er sett at gera uppskot til nýggjar lesiætlanir fyri fólkaskúlan og eina endurskoðan av fólkaskúlalógini.

Eftir nýggju frítíðarundirvísingarlógini er møguleiki fyri at seta á stovn frítíðarundirvísing, ið er á hædd við ta frítíðarundirvísing, ið boðin verður í hinum norðurlondum.

Lógin er farin at virka, men enn eru ikki allir møguleikar, ið lógin gevur, troyttir, enn vanta reglur og kunngerðir.

Menningin hevur verið stór. HF-stakgreinaskeið og skeið til stakgreinaundirvísing til fráfaringarroyndir fólkaskúlans umframt yrkiskend skeið og serundirvísing fyri fólk yvir skúlaaldur verður nú sett á stovn ymsastaðni í landinum.

Vegna vantandi kunngerð er tann tátturin, ið nevndur verður frítíðarvirksemi, enn ikki farin at virka.

Sitandi landsstýrið hevur lagt stóra áherðslu á at styrkja vinnulívsútbúgvingarnar og laga tær eftir tí føroyska samfelagnum.

Løgtingið hevur sum kunnugt samtykt eina lóg um yrkisskúla fyri fisk, ídnað og havbúnað, eins og lóg um sjóvinnuskúla liggur á tingborði. Peningur til hesar skúlar er settur á fíggjarlógina, og vónandi kunnu teir byrja komandi ár.

Nýtt motorpassaraskeið, ið varir 5 mánaðir, er sett á stovn. Fyrsta skeiðið av hesum slag fór fram í vár.

Víðkað maskinmeistaraprógv kann nú takast í Føroyum, og fyrsti flokkurin byrjar í heyst.

Fiskiskiparaútbúgvingin verður broytt, so at hon nú verður 1½ ár, og aftan á neyðuga siglingartíð verður møguleiki fyri at halda fram til skipsførara.

Tey formligu viðurskiftini í sambandi við 2. byggistig av Tekniska Skúla í Klaksvík og bygging av handilsskúla á Kambsdali eru í lagi, og er gongd komin á hesa byggingar.

Í hesum viðfangi kann nevnast, at ætlanin er at flyta skúlagongdina hjá veikstreymslærlingum heim til Føroya, eins og miðað verður ímóti við neyvum samstarvi við vinnulívið at dagføra lærlingaútbúgvingarnar og laga tær betur til føroyskt viðurskifti.

Ætlanin er at seta verkstaðarskúla á stovn á Tekniska Skúla í Klaksvík og

útbúgving til byggi- og/ella maskinteknikara á Tekniska Skúla í Tórshavn.

Til heystar byrjar ein landmálarateknikkaraútbúgving. Eftir avtalu við Journalistháskúlan í Danmark fer nú upptøkuroynd á henda skúla fram í Føroyum eina ferð um árið.

Umframt verandi sjúkrasystraútbúgving verður nú arbeitt við at seta á stovn sjúkrarøktaraútbúgving.

Nógv hevur verið tosað um, hvar í landinum skúlar og útbúgvingar skulu verða løgd, eitt nú Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy. Í staðin fyri at taka støðu til ein skúla og eina útbúgving í senn, arbeiðir landsstýrið við at gera ein heildarætlan.

Neyðugt verður at umskipa studentaskúlaútbúgvingina komandi ár, og ein ætlan er at gera eina liðiligari skipan í samsvar við HF. Tílík skipan verður at bera í sær, at fleiri skúlaformar kundu samarbeitt, og ein miðspjaðing av ymsum útbúgvingum kundi verið framd.

**Fróðskaparsetur Føroya**

Viðvíkjandi fróðskaparsetrinum verður í samgonguskjalinum sagt:

*»...miðað verður ímóti at útbyggja møguleikarnar fyri próvtøkulestri við Fróðskaparsetur Føroya og menna henda stovn sum hægri læristovn.«*

Við øktari játtan á fíggjarlógini í 1987 og nýggjari stýrisskipanarlóg, sum at kalla eitt einmælt løgting samtykti í vár, eru lunnar lagdir til tess, at fróðskaparsetrið kann víðka um virksemið sítt.

Væl fleiri tilboð um hægri útbúgving verða nú bjóðað, og fyri fyrstu ferð í Føroyum er møguligt at taka endaligt prógv á universitetsstigi. 2-ára høvuðsgreinalestur oman á exam.art prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, byrjar í heyst. Tá verður eisini farið undir eina 2-ára grundútbúgving í søgu og siðsøgu. Innan náttúruvísindi og tøknifrøði verður skipað fyri sonevndum BS-útbúgvingum og verkfrøðiútbúgvingum, ið taka 3 og 3½ ár. Sum dømi um nýtt tilboð er ein 3½ ára útbúgving í matverkfrøði.

Komandi lestrarár verða tilsamans einir 75-80 lesandi á fróðskaparsetrinum, nærum ein tvífalding afturímóti seinasta lestrarári. Harumframt eru nógv fólk í kvøldundirvísing og ymsum stakskeiðum, sum setrið skipar fyri.

Tann økta undirvísingin á setrinum merkist eisini í granskingini, sum bæði økist og gerst meira fjøltáttað. Dømi um ein nýggjan tátt innan bæði gransking og undirvísing er ætlanin um í 1988 at skipa eina deild fyri samfelagsvísindi.

Hetta, at fleiri av teimum ungu ikki nýtist av landinum til at nema lærdan lestur, er ein sjálvsagdur styrkur fyri samfelagið, og tann serkunnleiki, ið ein hægri læristovnur savnar og framleiðir, gevur fólki okkara størri medvit og sjálvbjargni.

Men útbyggingin av fróðskaparsetrinum, sum sett er í verk, gerst ikki eftir einum fíggjarári, og tí er neyðugt at hækka játtanina komandi árini, eins og sagt er frá í álitinum. Eisini eigur okkurt at verða gjørt fyri at bøta um tey trongu hølisviðurskiftini á fróðskaparsetrinum. Tað er eyðsæð, at Debesartrøð — umframt teir stovnar, sum longu eru har — ikki kann rúma einum fult útbygdum fróðskaparsetri, og landstýrið er sinnað til at bera so í band, at setrið kann fara undir bygging onkustaðni uttan fyri Debesartrøð um nøkur ár.

**Arbeiðsmarknaðarmál.**

Arbeiðseftirlitið verður framhaldandi útbygt við deildum kring landið. Í 1986 var ein deild skipað í Norðoyum. Í ár verður ein deild skipað í Suðuroy og í 1988 ein í Eysturoy. Sambart ta útbyggingarætlan, landsstýrið samtyktið á vári 1985, er ein deild eftir at skipa fyri Vágar og Norðstreym, og eigur hon at koma í 1989.

Í seinastu tingsetu varð lógin um arbeiðaravernd broytt, soleiðis at eitt arbeiðsumhvørvisráð verður skipað. Tað skal beinanvegin gera uppskot til eina arbeiðsumhvørvislóg.

———

Á fíggjarlógunum fyri 1985, 1986 og 1987 hevur normering verið til ein arbeiðsmedisinara í hálvtíðarstarvi. Á komandi fíggjarlógaruppskoti verður normeringin broytt til eitt fulltíðarstarv. Arbeiðsmedisinarin skal kanna og ávísa sambandið millum sjúkratilburðir og arbeiði. Hann skal eisini koma við tilmælum um ábøtur, soleiðis at talið á sjúkratilburðum, sum hava samband við arbeiðsumhvørvið, lækkar.

———

Fyri at bøta um tryggleikan á arbeiðsplássunum skipar arbeiðseftirlitið framhaldandi fyri skeiðum bæði her heima og í Danmark. Í september verður norðurlendsk ráðstevna um arbeiðsumhvørvi í fiskiídnaðinum hildin í Føroyum. Hetta er eitt áhugavert tiltak, tá hugsað verður um, at júst fiskiídnaðurin er ein munandi partur av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

———

Í seinastu tingsetu varð lógin um trygdargrunn veiðumanna broytt. Hann ber nú heitið »Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir á fiskivirkjum«. Higar til hevur grunnurin tryggjað fiskiførum og manningum 90% av ágóðanum, tá og um teirra fiskakeypari fór á húsagang. Aftaná lógarbroytingina hava løntakarar á fiskavirkjum somu trygd. Lóg um trygdargrunn fyri aðrar løntakarar er eisini samtykt. Hvussu hesin skal virka, hvar og hvussu hann verður at umsita, og nær hann fer undir virksemi, fer landsstýrið at áseta í kunngerð.

———

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja lóggávu um arbeiðsmarknaðarpensjón og at kanna møguleikarnar fyri eini fastlønar- ella minstulønarskipan fyri fólk á fiskavirkjum.

Nevnd av serkønum fólki er sett at arbeiða við hesum málum. Saman við landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum hevur serkøna nevndin verið á kanningarferð í Danmark, Noregi og Svøríki. Í samband við, at tey her nevndu mál, sum viðkoma pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, verða viðgjørd, hevur landsstýrið samtykt at skipa eitt arbeiðsmarknaðarting, har umboð fyri avvarðandi feløg – umboðandi báðar partar á arbeiðsmarknaðinum – fáa sæti. Í alt er talan um 19 feløg.

———

Nýggj javnstøðunevnd varð sett í september 1986, og reglugerð varð gjørd fyri

hana, sum landsstýrið hevur góðkent. Nevndin hevur m.a. viðgjørt fleiri kærur um kynsmismun. Ásannandi, at uttan lógargrundarlag er torført at gera nakað munagott, arbeiðir nevndin nú við eini føroyskari javnstøðulóg. Eisini hevur nevndin tikið upp samstarv við aðrar javnstøðunevndir og -ráð innan Norðurlandaráðið, og kann verða nevnt, at á fundi tann 11. august í ár hjá norðurlendskum javnstøðuráðharrum er tann føroyski ráðharrin fyrstu ferð við.

**Samskiftisviðurskifti**

Í løtuni verður arbeitt fram ímóti at fáa sett eina smaskiftisdeild á stovn í landsumsitingini. Endamálið er, at deildin skal veita landsstýrismanninum í samferðslumálum (landsstýrinum) tann stuðul, sum er neyðugur til at betra møguleikarnar fyri effektivt at útinna leiðsluuppgávurnar innan økið.

Í fylgiskjølunum til hesa røðu hevur landsverkfrøðingsstovnurin eitt nágreiniligt yvirlit yvir arbeiði í gerð ella framd í tingárinum 1986/87.

Ferjulegan við Gomlurætt er seinkað nakað. Hetta arbeiði verður útboðið í oktober í ár.

Funningsvegurin kemur igjøgnum í ár.

Tvær tunnilsgerðir fóru í gongd fyrr í ár: Sumbiar — og Kaldbak/Signabøtunnilin. Næsta ár verður aftur farið í holt við Gásadalstunnilin.

Landsstýrið hevur samtykt at farast skal í gongd við nýggja havnarætlan. Uppskot verður lagt fyri tingið í hesi tingsetuni.

— — —

Sum kunnugt hava samráðingar verði um flogmálið, og fyriliggja ítøkilig uppskot, sum støða skal takast til.

Í spurninginum um flogmálið hevur tað eydnast at sameina allar og øll tey, sum hava áhuga fyri, at føroyingar koma upp í part, tá talan er um flúgving.

Tá støða er tikin og sáttmáli gjørdur, skuldi borið til at flogið við egnum flogfari, og borið til at fingið útbúgvið føroyingar innan flogferðslu.

Talan verður um flogskiparar, mekanikarar, flogternur, fyrisiting og onnur neyðug starvsfólk í einum vælvirkandi flogfelg. Helst verður talan um 20-25 arbeiðspláss.

Virksemið á Strandferðsluni er vaksið munandi hesi seinastu árini, bæði á sjógvi og landi.

Skip eru komin afturat,sum t.d. Dúgvan, ið varð sett inn í rutuni millum Skálafjørðin og Havnina, og er flutningurin av ferðafólki og bilum vaksin munandi.

Samstundis sum Tróndur varð leysur av rutuna inn á Skálafjørðin, var hetta skip sett inn í rutuna millum Tórshavn og Skopun, og eru møguleikarnir øktir munandi, bæði hvat ferðafólki og bilum viðvíkur. Meðan Ritan fyri bert ikki so langari tíð síðan sigldi 2-3 túrar um dagin so siglir Tróndur í dag 5 túrar hvønn vegin um dagin, og er hann um summarið fyri tað mesta fullsettur av bilum hvønn túrin.

Yvir um Vestmannasund er tørvurin fyri flutningi av ferðafólk og bilum vaksin so nógv, at Sam ongan møguleika hevur havt til at flyta tey nógvu ferðafólk og bilarnar. Í 1984 setti Strandferðslan gomlu Ternuna at røkja ferðasambandið saman við Sam, og hevur henda loysnin roynst væl, eins og fólk hava verið glað

fyri hetta skip, ið annars var nýtt sum eykaskip.

Hetta hevur stytt munandi um bíðitíðina, bæði á Oyragjógv og í Vestmanna.

Í summar er Teistin settur inn í siglingina saman við Smyrli til Suðuroyar og Klaksvíkar, soleiðis at túratalið og ferðasambandið er vaksið og betrað munandi, og við hesum sambandinum gerst møguleiki fyri at avlasta Ternuna á rutuni millum Leirvík og Klaksvík, ið hevur verið vaksandi, serliga er tað flutningurin av lastbilum, trailarum v.m., ið er øktur. Á øðrum rutum er túratalið eisini vaksið, sum t.d. til Nólsoyar, har Ritan í dag ger 4 túrar um dagin.

Í sambandi við keypið av Dúgvuni, og nú Smyril og Teistin sigla til Klaksvíkar, verður allur farmurin fluttur á mafi- vognum og trailarum við hesum skipum.

Inntøkan av farmaflutningi hevur verið vaksandi hesi tvey árini. Fyri árið 1986 vaks henda inntøka við umleið 14% í mun til árið 1985, og higar til er hesin vøkstur upp á umleið 25%, tó mugu hesi tøl takast við størsta fyrivarni, av tí at tey bert eru fyribilstøl. Ein orsøk til hesa hækking er eisini tað stóra virksemi innan byggisektorin, sum er í landinum.

Viðurskiftini á økinum strandferðslu og bygdaleiðum verða tikin upp til viðgerðar í heyst. Ein sera nágreinilig frágreiðing fyriliggur, sum lýsir virksemi stovnana, og miðað verður ímóti eini rationalisering av virkseminum hjá báðum stovnum.

Tann 1. oktober 1986 gjørdi Strandferðslan avtalu við Sjúkrahúsverkið um flutning av sjúklingum, læknum v.m., aftaná at Reyði Krossur verður lagdur. Henda skipan, har Tróndur altíð liggur til reiðar í Skopun, Ritan í Havn til Nólsoyar og Sam yvir um Vestmannasund, hevur roynst ógvuliga væl, og eru sjúklingar, ið hava havt fyri neyðini at verða fluttir til Landssjúkrahúsið, fluttir upp á skjótasta máta.

— — —

Á vári 1986 samtykti løgtingið 5-ára útbygging fyri telefonverkið.

Partar av hesi ætlan eru longu framdir.

Nýggja digitala telefonstøðin var tikin í nýtslu í juni í ár, og hevur henda stóra umlegging longu bøtt munandi um telefontænastuna. Digitaliseringin verður at halda fram, og í 1988 verður øll Suðuroyggin digitaliserað.

Fylgisveinastøðin á Húsareyni, ið skal tryggja telefonsambandið millum Føroyar og útheimin, var eisini liðug í juni í ár, men nytta fæst ikki av hesi støð fyrrenn seinni í ár,tí fylgisveinurin, ið støðin skal samvirka við, er vorðin seinkaður av trupulleikum við fronsku ARIANE - rakettini, og tí er uttanlandssambandið í styttri tíð nervað av, at ov fáar linjur eru til útheimin.

Til heystar byrjar uppsetingin av Nordisk Mobil Telefon, sum virkandi partur av NMT-skipanini í hinum norðurlondunum. NMT-fartelefonin væntast at verða tikin í nýtslu á sumri 1988.

Nú er komið upp undir land við nýggja 200-KW millumbylgjusendaranum til útvarpið, og verður landsstýrið at taka endaliga avgerð um byggingina áðrenn 15. august. Telefonverkið metir, at byggingin kann vera liðug í seinnu helvt av 1988, og verður støðin bygd í syðru helvt av Suðuroynni, annaðhvørt í Akrabergi ella Porkerisnesi.

Seinastu 2 árini hava verið samráðingar millum landsstýrið, P & T, Store Nordiske og telefonverkið um yvirtøku av telegrafstøðini,sum síðani 1906 hevur

verið rikin av Store Nordiske. Store Nordiske hevur boðað frá, at teir ynskja at taka seg burtur úr hesum virksemi. Landsstýrið hevur boðað P & T frá, at landsstýrið principielt hevur góðtikið at fremja hesa yvirtøku, har telefonverkið í flestum førum kemur inn í myndina sum arbeiðstakari fyri P & T í staðin fyri Store Nordiske.

Millum partarnar verða í næstum samráðingar um viðurskiftini hjá starvsfólkunum á telegrafstøðini skulu tryggja setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum á støðini aftan á eina yvirtøku.

**Lógarmál**

Á lógarmálsøkinum eru tað serliga tær tríggjar sjóvinnulógirnar, sum verða viðgjørdar í løtuni.

Talan er um nýggja sjóvinnulóg, sjómannaløgtingslóg og lóg um manning av skipum. Øll trý lógaruppskotini vóru frammløgd, áðrenn vertrartingsetan endaði, og verða nú viðgjørd í løgtingsins rættarnevnd ið virkar sum millumtinganevnd, tí uppskotini eru so rúgvumikil.

Orsøkin, til at landsstýrið ynskir at seta nýggjar reglur í gildi fyri nevnda øki, er tann, at galdandi lógir eru ótíðarhóskandi og ikki fremja tey krøv, sum altjóðasáttmálarnir á sjóvinnuøkinum seta.

Serliga er tað tann nýggja sjómansútbúgvingin og STCW-sáttmálin saman við øðrum altjóðasáttmálum, ið seta ørðvísi krøv á nevnda øki. Eftir at løgtingið í sept. 1984 samtykti, at STCW-sáttmálin skuldi galda fyri Føroyar, setti landsstýrið arbeiðsbólk at arbeiða við hesum lógum. Arbeiðsbólkurin fór til verka í januar 1986.

Tað, at nýggju lógarreglurnar enn ikki galda í Føroyum, hevur skapt trupulleikar, tá føroyingar skulu mynstra við útlendskum skipum. Hetta hevur sitandi landsstýri fingið ábreiðslur fyri, men landsstýrið hevur gjørt sína skyldu og hevur arbeitt framúr skjótt við hesum málum.

Landsstýrið fekk tey lidnu lógaruppskotini frá arbeiðsbólkinum tann 11. mars 1987. Longu 25. mars vóru tvey av uppskotunum løgd fram á tingi, meðan tað triðja var lagt fram 7. apríl. Talan er um tilsamans 134 lógargreinir. Við viðmerkingum fyllir lógarverkið 130 bls. Sostatt kann eingin pástanda, at landsstýrið hevur drálað við hesum lógararbeiði.

Landsstýrið vónar, at tingið verður ført fyri at avgreiða hesar lógir sum allarskjótasta.

**Dálking — Umhvørvi**

Umhvørvisdálkingin er farin at gera veruliga vart við seg seinastu árini.

Hon kennir sum kunnugt ikki landamark, og eru í seinastuni komin slík sløg av dálking upp á tal, at vit kenna eitt ávíst máttloysi.

Kortini er neyðugt, at vit fylgja so væl við sum gjørligt og ávirka í tann mun, vit megna til tess at fyribyrgja vannlukkum, sum vit valla duga at hugsa okkum fylgjurnar av.

T.d. ávirkar Dounray-ætlanin okkum nógv, og kenna vit ótryggleika av henni.

Landsstýrið heldur, at arbeiðið við føroysku umhvørvislógini kemur so mikið

áleiðis, at løgtingið nú fær uppskotið til viðgerðar.

**Mentunnarstovnar**

Seinnapartin av 1988 fer útvarpið – sum nevnt – at fáa 200 KW millumbylgjusendaran, sum arbeitt hevur verið við í nøkur ár. Tá verða líkindi at gera sendingar til sjófólkið og føroyingar, sum eru burturstaddir, og við hesum sendarum verða líkindi til at gera sendingar til útlond, sum viðgera føroysk málsøki og spurningar. Eisini verða betur líkindi at andøva móti tí fremmanda mentunnarárgangi, sum vit kunnu vænta okkum frá sendingum, ið sendar verða um satellitstøðir.

— — —

Arbeiðsumstøðurnar í sjónvarpinum eru vánaligar, og neyðugt verður skjótt at gera nakað, so at starvsfólkið fær rúmari arbeiðsumstøður.

Frá 1.januar í ár hevur sjónvarpið leigað Havnar Bio í eitt fimm ára skeið. Hetta hølið er nú gjørt til upptøkuhøli og verður tikið í nýtslu nú eftir summarfrítíðina. Í hesum høli verða fyrst og fremst uppsetingar til ymiskar fastar sendingar sum t.d. Lítlating og Gluggan. Hølið í Havnar Bio sparir ein part av tí arbeiði, sum hevur staðist av at broyta uppsetingina í upptøkuhølinum í Vørðsluni, hvørja ferð ein sending skal takast upp, men samstundis ger hetta, at arbeiðið nú skal avrikast á trimum støðum, og tað ger tað torførari at leggja til rættis.

Loysn á hølisviðursviðurskiftunum hjá sjónvarpinum skal finnast, antin við at keypa hús ella byggja. Roknast kann við, at hóskiligt sjónvarpshús kostar einar 50 mió. kr. at byggja.

Neyðugt verður at játta eina peningaupphædd árliga á fíggjarlógini til hetta endamál. Einasta inntøkukeldan hjá sjónvarpinum er hyggjaragjaldið, og tað røkkur ikki til meira enn raksturin. Skal sjónvarpið sjálvt vera við til at fíggja nýggj hús, mugu aðrar inntøkukeldur útvegast stovninum.

Í teimum báðum sjónvarpsgrunnunum, sum standa á fíggjarlógini, eru tilsamans 28,9 mio. kr. Men úr hesum grunnum eru brúktar tilsamans 28 mió. kr., so tøkar eru bert 900.000 kr.

Tó skal viðmerkjast, at peningurin er nýttur úr grunninum at keypa tey gomlu útvarpshúsini á Bryggjubakka fyri stívliga 1,5 mió. kr. Haraftrat eru 8,4 mió. kr. nýttar til sendinetið, sum sambært lóg skal gjaldast úr landskassanum.

Landsstýrið ætlar at gjalda hesar báðar upphæddir aftur úr landskassanum í grunnarnar, sum tá hava 10,8 mió. kr. tøkar. Tað mesta av tí útgerð, sjónvarpið hevur, kann flytast í onnur høli.

— — —

Ein stovnur á Debesartrøð, sum hevur stórar hølistrupulleikar, er Føroya Landsskjalasavn. Savnið hevur til endamáls at goyma bøkur og skjøl hjá tí almenna, soleiðis at hesi altíð eru til taks hjá myndugleikunum. Eisini er endamálið at varðveita skrivligu keldurnar til Føroya søgu, at skipa og skrásetahesar keldur og gera tær atkomuligar hjá granskarum og almenningi.

Savnið, ið fevnir um skjøl frá 1615 til okkara dagar, húsast í løtuni í 4 ymiskum

bygningum — nakað sum ger tað torført at røkja tær uppgávur og tænastur, ið ein eigur at kunna krevja av slíkum stovni.

Landsstýrið fer sum skjótast at takað støðu til, hvussu bygging av nýggjum Landsskjalasavni kann setast inn í íløgumyndina. Hetta hevur eisini samband við viðurskiftini hjá Fróðskaparsetrinum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

— — —

Nevndin, sum landsstýrið setti at endurskoða fólkabókasavnslógina frá 1968 við tí fyri eyga, at lógin eisini skal fevna um skúlabókasøvn, er nú liðug við arbeiði sítt og hevur latið landsstýrinum álit um málið.

Nevndin hevur gjørt uppskot til eina lóg, sum fevnir bæði um almanna- og skúlabókasøvn.

Í álitinum verður m.a. mælt til at skipa landið í 7 meginbókasavnsdømi, ið hvørt skal hava eitt væl útgjørt meginbókasavn, sum tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum. Nevndin skjýtur eisini upp, at sett verður á stovn ein bókastova, ið skal samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til bókasøvnini.

Høvuðstankin í hesum álitinum er at leggja almanna- og skúlabókasavnsuppgávurnar uttanfyri tað dagliga virksemið hjá landsbókasavninum, soleiðis at Landsbókasavnið kann fara undir aðrar stórar uppgávur, uppgávur, sum bert Landsbókasavnið kann og eigur at taka sær av, eitt nú at gera eina fullfíggjaða skráseting av Føroyadeild savnsins, og ein útbyggjan av vísindadeild savnsins er eisini hóskandi nú, ið farið verður undir hægri lestur á Fróðskaparsetrinum.

— — —

Í vár flutti Fornminnissavnið arbeiðshøli síni niðan í bygningarnar hjá Royndarstøðini í Hoyvík. Einans framsýningar savnsins eru nú eftir á Debesartrøð. Hetta er fyrsti liður í eini ætlan um at flyta alt fornminnissavnsvirksemið til Hoyvíkar og fáa Fornminnissavnið at virka í neyvum samljóði við siðsøguliga umhvørvið á gamla Hoyvíksgarið og vakra náttúrumhvørvið har um leiðir.

Sum fríøki hevur Hoyvíksøkið alsamt vaksandi týdning fyri almenningin, og mitt í lendinum er gamli Hoyvíksgarður, hampiliga heilskapaður gamal bóndagarður við sethúsum, úthúsum, bøi, bøgørðum, geil o.s.fr., sum tó er í vánaligum standi. Ætlanin er so vítt gjørligt at fáa sett bygningar og umhvørvi í upprunaligan sand og lata tað vera atkomiligt fyri almenningin, so gamli garðurin í sjálvum sær kann virka sum útisavn.

Landsstýrið er sinnað, so skjótt løgir eru, at royna at loysa uppgávurnar í samband við avtaluna um at fáa aftur lutir og forngripir frá Nationalmuseet.

**Almenna umsiting — Ríkisstuðulin**

Segði fyri tveimum árum síðani, at almenna umsitingin var vorðin nakað niðurslitin, og at politikkararnir, sum hava ábyrgd av hesum, helst hava latið seg ávirka av teirri ósonnu agitatión um bólgnan av almennari umsiting, ið bert kostar pening og onga nyttu ger, og at serliga vinnulívið ongan tørv hevur fyri »service».

Sannleikin er hin øvugti, at valla nakað samfelag hevur verið umsitið av so fáum sum hitt føroyska, serliga hvat veruligari landsfyirisiting viðvíkur.

Vit standa tí á einum vegamóti, har neyðugt er at taka heilt aðrar partar fyri seg.

Økt krøv standast av áhaldandi samfelagsútbyggingini, og økt krøv koma í samband við umleggingarnar av ríkisstuðlinum.

Hetta hendir samstundis sum samfelagsvirksemið er óvanliga stórt, og eftirspurningurin eftir útbúnum fólki tí er sera stórur.

Í kappingini við privata marknaðin um løn, tapir hitt almenna sum oftast, og tí fáa vit kanska ikki framt ta útbygging, sum er so neyðug.

Vit mugu so kortini royna.

Í sjálvari landsumsitingini er ætlan gjørd um uppbýti í einar 6 deildir hvør við sínum stjóra, og innan fleiri av stovnunum fer eisini eitt sundurbýti framm, sum skuldi smidlig — gjørt virkanina hjá hesum stovnum, sum almenningurin og vinnulívið so sterkt hava brúk fyri, og sum hitt almenna sjálvt hevur brúk fyri til at tryggja, at samfelagsorkan verður umsitin og brúkt so skilagott, sum til ber.

T.d. hava danir leingi verið afturhaldandi við játtanum til neyðugar útbyggingar í Føroyum, her kann nevnast útbyggingin av heilsuverkinum, skúlaverkinum, sosiala verkinum og havnaverkunum.

Nú játtast kann bert frá føroyskari síðu kemur væntandi eitt øki økt trýst at gera seg galdandi, eitt nú í krøvum frá kommunum. Hetta ger, at vit mugu umhugsa rammujáttanir innan hvørt øki fyri eitt áramál í senn.

Bert hetta setir stór krøv til eina dugandi og virkna umsiting.

**Undirgrundin**

Sum nevnt í fjør hevur gingið sera illa at koma til sættis við danir um eina undirgrundsavtalu.

Teir hava ikki viljað tala um yvirtøku, men bert um eina sonevnda ráevnisskipan.

Vit mugu nú sjálvi gera uppskot, sum bæði fevna um, at undirgrundsmál verða sermál og um ráevnisumsiting, sum tryggjar ríkinum ávís áhugamál, men væl merkja trygdir, sum einans koma upp á tal undir teirri fortreyt, at málsøkið gerst føroyskt sermál.

**Grindadráp**

Ágangurin móti rætti okkara at drepa grind er munandi minkaður, hóast onkur ørvitisfiskur enn er at síggja í bløðum og sjónvarpi. Á fundi á Altjóva Hvalanevndini, IWC, varð hildið fast um, at hesin felagsskapur einki hevur við grindahval at gera. Tó hevur tann viðferð, sum m.a.Ísland hevur fingið í hesum felagsskapi, givið grund til ørkymlan, og landsstýrið hevur tí tikið spurningin upp við danskar ríkismyndugleikar fyri at sleppa undan at verða somu lagnu fyri sum

Ísland, har ein meiriluti av limalondum í IWC, við USA á odda, gjørdu eina samtykt, sum greitt er móti sjálvum IWC sáttmálanum. Áhaldandi arbeiðið at bøta um drápsháttin er besta trygd fyri at halda ágangnum burtur.

Syrgliga vanlukkan, har tríggir ungir menn lótu lív á veg til arbeiðis okkara vegna at útvega vitan um grindastovnin, hevur skelkað okkum, og vit mugu hava djúpastu samkenslu við teim, sum eftir sita.

**Mc Cloy**

Eri vorðin spurdur, um eg ætli at kanna, um landsstýrið hevur meiriluta í tinginum fyri avgerðini um at treyta vitjanarloyvið til Mc Cloy av váttan um, at treyt løgtingsins um atomvápnaloysi var uppfylt, og um eg ætli at kanna um hetta skal hava parlamentariskar avleiðingar.

Svarið er nei.

Hernaðar- og uttanríkisspurningar eru í seinasta enda ábyrgd stjórnarinnar, og tað vildi verið øvugt at leita eftir álitis — ella misálitisváttan í tinginum, sum onga avgerð skuldi ella skal taka um Mc Cloy, tá skiftandi stýri í Føroyum onga avleiðingar hava tikið av, at tey beinleiðis eru komin í minniluta í málum, har vit hava fult lóggávuvald.

T.d. kann nevnast, at eg metti málið um avtalubrot fólkafloksins í Lassa II málinum so álvarsligt, at eg mælti til at útskriva val í 1979. Tá helt einmæltur fólkaflokkur, einmæltur tjóðveldisflokkur og partur av javnaðarflokkinum, at eingin grund var at taka tørvandi løgtingsmeiriluta í álvara.

Heldur ikki tykist nakar hava havt stórar moralskar trupulleikar av, at øll okkara parlamentariska skipan var sett út av spælinum í 1981-85 av paragraf 13.

Avgerðin um Mc Cloy er avgerð, sum umsitingarvaldið — landsstýrið — og ikki tingið skuldi taka.

Meti, at landsstýrið eigur at halda seg til tær samtyktir, tingið hevur gjørt, so leingi tær galda, og rokni við, at hesum tekur ein fullsamd samgonga undir við.

Hin vegin leggi eg meg ikki út í, um andstøðan ella partar av henni vilja seta fram misálitisuppskot í tinginum, men boði heldur ikki frá í fórhond, um leiðari landsstýrisins tekur parlamentariskar avleiðingar av slíkum møguligum missáliti.

**Liggja á takinum**

Vit ganga nú inn í eitt valár, og væntandi kemur hetta at ørkimla tingarbeiðið nakað.

Yvirbjóðing og taktiskt spæl verður helst meira enn seinastu tingsetu, men vónandi forðar hetta ikki samgongu og andstøðu at liggja á takinum, soleiðis at teir batar, fingnir eru í búskapi okkara, verða varðveitir og mentir, so vit, tá vit fara út í valstríðið, kunnu siga, at vit bjóða okkum fram til at stýra einum sterkari, betri útbygdum og tryggari samfelag næsta valskeið.